# Suðuroyggin enn best fyri

**FÓTBÓLTUR** Hóast FC Suðuroy bara fekk javnt og TB mátti lúta, liggja tey bæði suðuroyarliðini framvegis best fyri, tá tað snýr seg um møguleikan fyri uppflyting

**Hilmar Jan Hansen**

FC Suðuroy, sum hevur sæð út sum sterkasta liðið í 1. deild hjá monnum higartil, fekk ikki leygardagin ynskiliga úrslitið á útivølli í Leirvík ímóti Víkingi. Einki mál kom fyri steðgin, men sjálvt um suðuroyarliðið kom framum eitt korter inn í seinna hálvleik, helt leiðslan sær bara í 10 minuttir, tá Víkingur við brotssparki kundi javna. Báðir partar høvdu møguleikar at avgera dystin, men einki mál kom aftrat, og hóast stigamissin, er FC Suðuroy framvegis einsamalt á odda.

Hitt suðuroyarliðið, TB, dragnaði eitt sindur, tá tað á heimavøllinum í Hvalba ikki eydnaðist at fáa nakað sum helst í dystinum ímóti einum av hinum uppflytingarkandidatunum, AB. Tvørturímóti fóru argjamenn avstað við øllum, tá teir við tveimum málum í seinna hálvleiki tryggjaðu sær sigurin. Sum skilst, hevði AB yvirvág tað nógva av dystinum og vann uppiborið.

### NSÍ ímillum

Teir næstbestu hjá NSÍ hava havt nøkur góð úrslit á rað og hava nú lagt seg millum FC Suðuroy og TB á stigatalvuni. Hesa ferð var NSÍ á vitjan hjá teimum næstbestu hjá EB/Streymi, og við einum máli í hvørjum hálvleiki eydnaðist teimum gulu at vinna 2-0. Nú er tað blivið til fýra sigrar á rað til NSÍ, og tað røkkur altso til næstfremsta plássið.

Ikki hevur gingist heilt eftir vild hjá FC Hoyvík, men síðstu dystirnar hevur sæð betur út, og um vikuskiftið eydnaðist at vinna grannauppgerðina ímóti HB við einum máli. Hoyvíkingar byrjaðu illa, men fingu kortini einasta málið í dystinum, tá bara eitt korter var farið, og eftir tað stóð FC Hoyvík fyri tí mesta, hóast tað ímóti endanum fyri tað nógva snúði seg um at verja, tí liðið fekk ein spælara útvístan, tá eitt korter var eftir.

Undan dystinum um vikuskiftið var besta úrslitið hjá skálamonnum ein javnleikur, og eftir fyrra hálvleiki at døma, gjørdist tað kanska einki mætari, nú næstbesta manningin hjá 07 Vestur vitjaði, tí hálvleiksstøðan var 0-0. Men eftir steðgin gjørdi Skála bart og skoraði fýra ferðir, so talan gjørdist um ársins fyrsta sigur, ið enntá gjørdist sera tryggur, tá avtornaði.



**ANNAR SIGUR Á RAÐ**

*FC Hoyvík, sum skuldi verið ein av uppflytingarkandidatunum, megnaði um vikuskiftið at vinna annan sigurin á rað, tá spælt varð ímóti grannunum úr HB, og nú eru hoyvíkingar mitt á stigatalvuni*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

# AB og KÍ fara avstað

**KVINNUFÓTBÓLTUR** AB og KÍ vunnu sínar dystir og eru nógv fremst í bestu kvinnudeildini, har HB-kvinnurnar fingu sín fyrsta sigur hetta kappingarárið

**Hilmar Jan Hansen**

Hjá teimum báðum fremstu kvinnuliðunum er eingin slingur í valsinum, og bæði tvey vunnu sínar dystir um vikuskiftið. Tað ger, at hóast bara seks umfør eru farin, eru AB og KÍ longu heili níggju stig framman fyri næsta liðið.

AB tók hesa ferð ímóti Víkingini, og hesin dysturin varð longu avgjørdur fyri steðgin, tá tað var 3-1 til AB. Tað var tó Víkingur, ið fekk betru byrjanina og legði seg á odda í sjeynda minutti, men bara tríggjar minuttir seinni hevði AB javnað. AB fekk eitt mál aftrat í seinna hálvleiki og er saman við KÍ á odda, men hevur tó betri málúrtøku.

KÍ vann eisini sín heimadyst hesa ferð, sum var ímóti B36 á triðja plássi. Kvinnurnar úr Havn hava annars havt eitt sindur av viðgongd í síðstuni, men ímóti KÍ var mótstøðan ov hørð. KÍ fekk eitt mál í hvørjum hálvleiki og hevði tamarhald á tí mesta, so orkan hjá B36 fyri tað nógva fór til at verja.

Triði dysturin var á Skála, har HB var á vitjan, og her hendi tað óvæntaða, at HB fór avstað við sigrinum, hóast Skála var á odda 1-0 og brendi brotsspark, ið vildi økt um leiðsluna til 2-0. Sum skilst, misti Skála eina tveir spælarar út við skaða, og tað vísti seg ímóti endanum, at HB megnaði at skora tvær ferðir og vinna sín fyrsta sigur hetta kappingarárið.

*hilmarjan@sosialurin.fo*

## Føroyska 1. Deild *menn*

| NR. | LIÐ | DYSTIR | VUNNI | JAVNT | TAPT | + MÁL | - MÁL | +/- | STIG |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | FC Suðuroy | 5 | 4 | 1 | 0 | 17 | 7 | +10 | 13 |
| 2 | NSÍ II | 5 | 4 | 0 | 1 | 15 | 5 | +10 | 12 |
| 3 | TB | 5 | 3 | 1 | 1 | 15 | 5 | +10 | 10 |
| 4 | AB | 5 | 3 | 0 | 2 | 15 | 7 | +8 | 9 |
| 5 | EB/Streymur II | 5 | 3 | 0 | 2 | 12 | 9 | +3 | 9 |
| 6 | FC Hoyvík | 5 | 2 | 1 | 2 | 8 | 12 | -4 | 7 |
| 7 | HB II | 5 | 2 | 0 | 3 | 6 | 12 | -6 | 6 |
| 8 | Skála | 5 | 1 | 1 | 3 | 7 | 10 | -3 | 4 |
| 9 | Víkingur II | 5 | 0 | 2 | 3 | 3 | 12 | -9 | 2 |
| 10 | 07 Vestur II | 5 | 0 | 0 | 5 | 4 | 23 | -19 | 0 |

## Føroyska 1. Deild *kvinnur*

| NR. | LIÐ | DYSTIR | VUNNI | JAVNT | TAPT | + MÁL | - MÁL | +/- | STIG |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | AB | 6 | 5 | 1 | 0 | 24 | 4 | +20 | 16 |
| 2 | KÍ | 6 | 5 | 1 | 0 | 20 | 2 | +18 | 16 |
| 3 | B36 | 6 | 2 | 1 | 3 | 6 | 14 | -8 | 7 |
| 4 | Víkingur | 6 | 1 | 1 | 4 | 14 | 18 | -4 | 4 |
| 5 | Skála | 6 | 1 | 1 | 4 | 5 | 13 | -8 | 4 |
| 6 | HB | 6 | 1 | 1 | 4 | 3 | 21 | -18 | 4 |